## Ársins sangur:

# -Vit fáa ongantíð nokk

**- At spæla hann er øgiliga, øgiliga stuttligt. Vit eru uppi at koyra hvørja ferð, og fólkini eru altíð við uppá tað, so nei, vit fáa ikki nokk av hesum sanginum, sigur Jón Jacobsen, sangari í Grandmas Basement**

Eydna Skaale

Ungu klaksvíkingarnir vóru fullkomiliga tiknir á bóli, tá ársins sangur varð avdúkaður.

- Hetta høvdu vit so slett ikki væntað. Vit høvdu kanska roknað við, at vit kundu gerast árisins besti nýggi bólkur, men hatta var púra óvæntað, sigur Jón Jacobsen, sangari í Grandmas Basement, sum heldur, at hetta er ein ábending um, at teir skulu halda á við tónleikinum.

- Nú hava vit fingið eitt stórt herðaklapp, so nú er bara at koyra á. Vit byrja í øllum førum tað nýggja árið við at spæla norði í Klaksvík, so til Havnar og okkurt er í Suðri eisini. Men vit royna bara at taka tað bara sum tað kemur.

Grandmas Basement eru kendir fyri teirra argandi sangir, og tað er kanska ikki so løgið, heldur Jón Jacobsen.

- Eg haldi, at tað er soleiðis, vit eru. Vit eru ikki nakrar seriøsar typur. Tað skal vera stuttligt, nemt og fólk skulu kunna syngja við. Vit vita væl, at vit ikki eru nýskapandi, og tí kemur hetta púra óvart á okkum, tí tað eru nógvir sangir, sum sláa ígjøgnum uttanlands, sum ikki eingong komu á listan. Men tað er kanska okkara fjepparaskari, sum júst hevur staðið sína roynd, sigur hann flennandi

Tá hann verður spurdur, um tað er nakað evnið, teir ikki tora at syngja um, ivast Jón eina løtu.

Nei, vit eru ikki bangnir fyri nøkrum evnið, men tað er kanska ikki alt, sum almenningurin tolir. Eg haldi, at man kanska líka skal hugsa seg um, áðrenn man sendir løg út, sigur Jón smílandi. -Men, leggur hann smílandi afturat, - Tað er nokk av tilfari at skriva um, serliga í einum lítlum samfelagið, sum okkara, so kanska tað kemur eitt nýtt hitt í 2011.



*Grandmas Basement, sum er ungi, sprelski klaksvíksbólkurin, framførdu ársins sang: Hon fær ongantíð nokk. Teir vóru tilnevndir til tvær planetir og vunnu sum nevnt fyri ársins sang*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ársins útgáva:

# Tvey gjørdist nummar eitt

**Fyrst gjørdi hann saman við øðrum góðum kreftum aldarinnar fløgu fyri 20 árum síðani. Uppfylgjarin, Tvey, gjørdist, against all odds, sum Terji Rasmussen tók til, ársins fløga í 2010**



*Terji Rasmussen var stórliga bilsin av at fáa eina Planet*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Rólant Waag Dam

Eivør, Teitur, Hanus G og SIC. Øll teljast millum okkara fremstu og bestu umboð fyri sína tónleikagrein og góvu hvør sína fløgu út í 2010. Eivør, Teitur og ikki minst SIC hava fingið nógv rós uttanlands fyri sínar útgávur, ummælari hjá Dimmalætting, Uni Leitisstein Hansen, hevur kosið fløguna hjá Hanusi G. Johansen millum bestu føroysku útgávurnar nakrantíð.

Men tá dómsnevndin hevði tikið sína avgerð og sms-atkvøðurnar taldar saman á Planet Awards, stóð útgávan hjá Terja & Føstufressum omanfyri allar hesar. Fleiri vóru bilsin, ikki minst høvuðspersónurin sjálvur.

- Eg gjørdist kløkkur av at vera millum tey tilnevndu. Vit hava fingið nógvar sera góðar fløgur í ár, og í fótbóltsverðini vildu tú sagt, at hetta var ein dynamittbólkur, eg var endaður í, helt Terji Rasmussen flennandi fyri, sum eisini gjørdi sítt til at vinna.

- Eg má viðganga, at eg atkvøddi upp á meg sjálvan tríggjar ferðir. Eg brúkti 30 krónur upp á tað, men tað er eitt sindur pínligt, um tað er tað, sum hevur gjørt meg til vinnara í kvøld, segði Terji Rasmussen við Rás2.

Undir øllum umstøðum gjørdist fløgan Tvey nummar eitt á ársins Planet Awards. Og sum so mong onnur, er Terji Rasmussen eisini fegin um hana.

- Vit kunnu allir standa fult inn fyri henni. Vit hildu, at tað helst fór at taka eitt sindur av tíð, áðrenn hon kom inn undir húðina á fólki, men tað gongur eftir øllum at døma skjótari enn væntað, ásannaði Terji Rasmussen, sum sjálvur hevði ein annan favoritt til ársins fløgu.

- Skuldi eg sjálvur valt, heilt objektivt, so hevði valt Teitursa fløgu. Hon er fantastisk, segði Terji Rasmussen.